Meginfelag Áhugaleikara Føroya
Undir Pisuvarða 2 * FO-100 Tórshavn * Tel. 285624 * E-mail: maf@maf.fo * www.maf.fo

# At skriva stuttleik

## 18. – 20 mars 2022 á Gjáargarði



Set kross í kalendararn **18. – 20. mars 2022** og tekna teg til skriviskeiðið **At skriva stuttleik**, ið MáF skipar fyri á Gjáargarði. Tveir spennandi dagar har tú hevur møguleika at menna tíni hugskot til eina søgu á palli í einum kreativum og spennandi umhvørvi.

Undirvísari verður **Gunvør Reynberg,** ið er útbúgvin sjónleikari á Statens Teaterskole og hevur arbeitt sum sjónleikari á eitt nú Aalborg Teater og Det Kongelige Teater og eisini hevur spælt í fleiri kabarettum. Umframt at arbeiða sum sjónleikari og leikstjóri, hevur Gunvør í fleiri ár arbeitt sum tekstahøvundur, har hon hevur skrivað tekstir til m.a. fleiri kabarettir og poppsangir, og eisini hevur hon skrivað fleiri barnabøkur og somuleiðis umskrivað barnabøkur til eitt nú familjusangleikir.

Hevur tú eina góða (stutta) søgu, ið tú kundi hugsað tær at sett á pall? Manglar tær íblástur í at koma í gongd við at skriva? So er hetta skeiðið nakað fyri teg. Á hesum skeiðnum lærir tú, hvussu mann skrivar ein stuttan leik, har leikgongdin varar í minsta lagi 5 minuttir og í mesta lagi 15 minuttir. At skriva ein stuttan leik kann vera minst líka avbjóðandi sum at skriva ein langan leik, tí tú skalt við færri orðum skriva eina søgugongd, sum helst skal halda áhugan hjá áskoðaranum fangaðan. Á skeiðnum lærir tú, hvussu tú kanst skriva stutt og neyvt, og hvussu eisini tann stutta søgan kann skrivast á ein spennandi og áhugaverdan hátt og setast á pall.

**Undirvísingin verður leygardag til sunnudag frá kl. 09.00 – 17.00** við matarsteðgi á middegi umframt okkurt leskandi/etandi í smáum støðgum fyrra- og seinnapart. ***Gevi gætur, at møtt verður fríggjakvøldið 18. mars kl. 18:00 til vælkomst, samansjóðing og ábit.***

Prísurin fyri alt skeiðið íroknað uppihald er **kr. 2.000 (dupultkamar) / kr. 2.600 (einakamar)**. Avmarkað pláss.

Áhugaði kunnu fáa meiri kunning og tekna seg elektroniskt inni á heimasíðuni hjá MáF www.maf.fo ella við at fara inn á tiltakið ***At skriva stuttleik*** á Facebook. Skráseting er fyrst galdandi, tá ið goldið er á konto í **Eik Banka: 9181-185 132 4 í seinasta lagi 20. februar 2022**.